# Høgni vil einki siga um Tobba

**Torbjørn Jacobsen er til reiðar at stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin á Fólkatingsvalinum, men formaðurin í flokkinum vil ongar viðmerkingar gera um hetta**

FÓLKATINGSVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Torbjørn Jacobsen er ikki longur inni í hitanum hjá Tjóðveldisflokkinum, men hann er framvegis til reiðar at stilla upp fyri flokkin á Fólkatingsvalinum í februar. Og sleppur hann ikki á listan, hevur hann eisini nevnt møguleikan at stilla upp á egnum lista.

Torbjørn Jacobsen var næstfremstur á Tjóðveldislistanum á seinasta fólkatingsvalinum. Hann fekk 870 atkvøður og hevur sitið í Fólkatinginum sum eykamaður hjá Høgna Hoydal.

Nú er vátt komið í reiðrið teirra millum, og seinastu mánaðirnir hava verið merktir av ósemjuni millum formanninum í Tjóðveldisflokkinum og ein av størstu profilunum í flokkinum.

Hetta endaði við, at eykafloksting hjá Tjóðveldisflokkinum beint fyri jól heitti á tingmanningina um at koyra Torbjørn Jacobsen úr tingbólkinum.

### Nýggj støða skal takast

Nú skal eitt nýtt eykafloksting taka støðu til, hvussu listin hjá Tjóðveldisflokkinum til fólkatingsvalið skal síggja út, og her verður størsti spenningurin um Torbjørn Jacobsen.

– Eykaflokstingið skal gera av, hvør kemur á listan, og tí vil eg einki meira siga um tað, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum.

Kanst tú sum formaður í flokkinum ikki siga, hvørt Torbjørn Jacobsen skal stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin ella ikki?

– Eg tími ikki at snakka meira um Torbjørn Jacobsen. Hetta er ein avgerð hjá eykaflokstinginum.

Eykafloksting verður í Tjóðveldisflokkinum fyrsta dagin.



*Torbjørn Jacobsen er til reiðar at stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin á fólkatingsvalinum, men spurningurin er, um flokkurin vil hava hann á listan. Tað skal eitt eykafloksting gera av*

# Fólkatingsval 8. februar

Á middegi týsdagin boðaði Anders Fogh Rasmussen danska fólkatinginum frá, at nýtt fólkatingsval verður týsdagin 8. februar. Leysasøgur hava gingið í alt heyst um nær forsætisráðharrin fór at skriva út nýval, og nú er so endaliga greitt, at vit fyri triðju ferð í eitt ár aftur skulu í valhølini.

Anders Fogh Rasmussen kundi havt bíðað við at skriva út nýval til í heyst, men fremstu orsøkirnar til, at valið verður longu nú er, at stjórnarflokkarnir standa ómetaliga væl í veljarakanningunum, og stjórnin ikki megnar at gjøgnumføra kommunalreformin, áðrenn summarfrítíðina.

Í Fólkatinginum boðaði Anders Fogh Rasmussen eisini frá, at Vinstri og teir Konservativu leggja ikki frá sær, at flokkarnir fara á val sum ein maður. Forsætisráðharrin ásannaði eisini, at upprunaliga var ætlanin at skriva út nýval stutt eftir ársskiftið, men herviliga flóðaldan útsetti ætlanirnar.

**.páll**

HALDIÐ SOSIALIN




TEKNA TEG SUM HALDARA **NÚ.**
**450 kr** UM ÁRSFJÓRÐINGIN
-SPARIÐ **395 kr** Í MUN TIL LEYSASØLU

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna · 5 bløð)



Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______
Bústaður: ______
Postnr.: ______
Bygd/býur: ______
Telefon nr.: ______
Undirskrift: ______

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

## Norðuratlantsbólkurin eigur at halda fram

FÓLKATINGSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Eg haldi tað er 100 ferðir betri, at føroysku fólkatingsumboðini hava sín egna bólk á fólkatingi, enn at tey fara upp í ein danskan bólk í Fólkatinginum. Uttan mun, hvør flokkur kemur á Fólkating, er tað mín vón, at Norðuratlantsbólkurin heldur fram.

Sjúrður Skaale hevur verið skrivari í Norðuratlantsbólkinum síðan bólkurin var stovnaður stutt eftir fólkatingsvalið í 2001. Hann heldur, at arbeiðið í Norðuratlantsbólkinum seinastu hevur prógvað, at føroysku fólkatingsumboðini eru nógv sjónligari í Fólkatinginum, um tey virka í einum sjálvstøðugum bólki enn at stuðla einum donskum flokki.

– Okkara royndir vísa týðuliga, at vit gerast nógv sjónligari og betri hoyrd í einum sjálvstøðugum bólki. Síðan 1998 hava allir fýra teir størstu flokkarnir í Føroyum verið umboðaðir, og eg tori at pástanda, at vit hava verið nógv virknasti flokkur á Fólkatingið, sigur Sjúrður Skaale.

Nú Anders Fogh Rasmussen hevur skrivað út nýval, dettur bólkurin fyribils niðurfyri, og tað verður upp til komandi fólkatingsumboðini, um tey ynskja at bólkurin skal endurstovnast eftir valið 8. februar.

Norðuratlantsbólkurin er eitt tekniskt samstarv millum umboð fyri tríggjar flokkar á Fólkatingi. Seinastu trý árini hava Lars Emil Johansen, Kubik Kleist og Høgna Hoydal sitið í Norðuratlantsbólkinum.